

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 01 - 2013

# Boripallur rak á land í Alaska

Ein boripallur, sum Shell eigur, rak í gjár á land í Alaska, og myndugleikarnir bera nú ótta fyri einari umhvørvisvanlukku. Pallurin hevur rikið fyri vág og vind í fleiri dagar, og leygardagin vórðu teir 18 menninir tiknir av pallinum. Tað eydnaðist sjóverjuni at taka pallin upp á sleip, men í gjár slitnaði endin, og pallurin rak á land. Amerikanska sjóverjan sigur, at 567.000 litrar av dieselolju og 45.000 litrar av smyrjiolju eru í pallinum. Samstundis ávarar sjóverjan um, at illveður er á veg ímóti leiðini, har pallurin stendur, og veðurmenninir siga, at alduhæddin verður millum 10 og 12 metrar. Sambært Shell er pallurin 290 milliónir dollarar verdur. ? ?